gult cyan magenta svart



# Danir nýta PR-snildi í Føroyum

*GRINDAMÓTMÆLI. Verjuskipið, Hvidbjørnen er á veg til Føroya at hjálpa føroyingum at sleppa av við Paul Watson. Sambært eygleiðarar gera danskir myndugleikar hetta fyri at vísa, hvussu neyðugir teir eru í Føroyum*

HØGNI MOHR



*Danska forsætismálaráðið er við í eini ætlan at steðga Paul Watson. Føroyskir eygleiðarar halda, at hetta hevur týdning fyri, hvat føroyingar halda um fullveldi.*

***Savnsmynd***

Danska forsætismálaráðið er við í eini ætlan at steðga Paul Watson.

Í samstarvi við løgreglu og sjóverju hava teir sent verjuskipið, Hvidbjørnen til Føroya at fáa bilbukt við skipinum hjá Paul Watson, Ocean Warrior.

Løgreglan í Føroyum hevur at kalla lagt lok á málið um mótmælismannin, Paul Watson. Av løgreglustøðini í Havn verður sagt, at bara fútin kann úttala seg um málið. Og fútin er fámæltum sum vanligt.

– Eg havi biðið ríkisløgregluna hjálpa okkum í málinum um Watson, vil Mogens Nepper Christensen kortini vátta.

Men fútin vil ikki siga, hví teir halda tað vera neyðugt at senda eitt verjuskip við løgreglumonnum til Føroya. Og hann hevur onga meting av, um Watson er vandamikil.

– Tað er ikki okkara meining at blása málið upp. Vit vilja bert vera til reiðar at møta hesum serliga felagsskapi, sigur fútin.

**Nyrup vísir seg**

Staðfestast kann, at føroyska sjóverjan hevur lítið at siga í málinum um Watson. Tað eru danskir myndugleikar, løgregla og donsk sjóverja, ið ráða á hesum øki. Og hetta hevur sambært eygleiðarar, stóran politiskan týdning.

Ein politiskur eygleiðari sigur við Sosialin, at tað hevur týdning fyri danska forsætisráðharran, Poul Nyrup Rasmussen, at føroyingar skulu vita, hvat tað kostar at loysa.

– At danskir myndugleikar senda løgreglu og verjuskip til Føroya er fult í tráð við linjuna hjá forsætismálaráðharranum mótvegis føroyingum. Hann vil vísa, hvussu týdningarmiklir danskir myndigleikar eru í Føroyum. Føroyingar skulu merkja mun, um teir fáa fullveldi. Eitt er at seta krónutøl á, men aðrir hættir eru eisini. Føroyingar og danir eru áður komnir á tvørs í spurninginum um hvalaveiðu, og hetta er kanska ein háttur at bera í bøtuflaka fyri tí, sigur eygleiðarin.

Ein annar eygleiðari sigur, at støðan kundi týtt upp á, at danir vilja hava eina hending, har danskt verjuskip bjargar føroyingum undan tí ónda Paul Watson.

– Bæði Paul Watson og Poul Nyrup ætla at brúka føroyingar til at røkka sínum endamálum, vil hesin eygleiðarin vera við.

**Fútin avnoktar**

Danskir myndugleikar í Føroyum eru seinastu tíðina vorðnir sjónligari í Føroyum. Danska sjóverjan er farin at senda føroyskum fjølmiðlum tíðindi um sítt bjargingarvirksemi í føroyskum øki, hvønn mánaða. Eisini eru teir farnir at bjóða fjølmiðlum við til venjingar. Hetta var óvanligt áður.

Men Mogens Nepper Christensen sigur kortini, at danska løgreglan ikki hevur fingið boð um at vera meira sjónlig í Føroyum. Heldur ikki í sambandi við málið um grindina, sum sameinir føroyingar meira enn nakað annað.

**Vildu hava føroyska góðkenning**

Tað skilst, at Føroya Landsstýri er kunnað um, at forsterkningur er tilkallaður úr Danmørk í sambandi við, at Watson kemur.

Men landsstýrið ætlar sær ikki at blanda seg upp í arbeiðið hjá løgregluni. Ein kelda úr umsitingini sigur, at danir vildu hava landsstýrið at góðtaka virksemi sítt í sambandi við Watson. Úr landsstýrinum varð boðað frá, at løgreglan ikki hoyrdi undir landsstýrið, og at tað tí ikki kundi blanda seg uppí.

**»Sjóverjan er donsk«**

Sosialurin vildi fegin havt Vaktar- og bjargingartænastuna at svara, um teir høvdu megnað at loyst trupulleikan við Watson saman við løgreglumonnum í Føroyum. Men á á Vaktar- og bjargingartænastuni vísa tey til donsku løgregluna.

– Sjóverjan er donsk, og tað er løgreglan eisini, var stutta svarið frá Djóna Weihe á Vaktar- og Bjargingartænastuni. Hann gjørdi kortini greitt, at teir ikki halda seg vera settar til viks, og at teir fara at arbeiða sum vanligt.

**Í iva**

Kate Sanderson grindaráðgevi hjá landsstýrinum heldur, at tað er skeivt at gera ov nógv burtur úr, at Watson kemir til Føroya.

– Nú kann Watson siga, »ja, eg visti tað; føroyingar brynja seg til bardaga«. Nú kann Watson vísa føroyingar sum illar menn. Tað er avgerðin hjá løgregluni og sjóverjuni, hvussu teir handfara hetta mál, men eg havi sagt, at Watson fer at brúka hetta at øsa alt upp við, sigur Kate Sanderson, sum heldur tað vera ivavert at senda verjuskip við danskari løgreglu til Føroya

**Ikki frítt spæl**

Formaðurin í Grindamannafelagnum Ólavur Sjúrðarberg heldur, at tað er í lagi, at myndugleikarnir eru fyrireikaðir til at taka ímóti Watson.

– Watson skal ikki hava frítt spæl í Føroyum. Hvør Hanus og Janus skal so ikki leggja á Watson, sigur grindaformaðurin, sum ivast í um Vaktar- og Bjargingartænastan og føroysk løgreglufólk høvdu megnað at rikið Watson burtur.

**Onga viðmerking**

Færøernes Kommando, sum fyri stuttum fór undir at senda fjølmiðlunum tíðindatilfar um bjargingar og sjúkraflutningar, ið hon hevur framt í Føroyum, vil nú púrt einki siga.

– Vit útala okkum ikki. Og vit útala okkum heldur ikki um, hví vit ikki úttala okkum, sigur pressuoffiserurin á Marinustøðini, sum heldur ikki vil upplýsa, hvussu nógv donsk verjuskip eru í føroyskum øki í løtuni.



*Hvidbjørnen fer eftir boðum frá donskum myndugleikum at leggja upp í stríðið millum føroyingar og felagsskapin, Sea Shepherd, um hetta verður hildið at vera neyðugt.*

*Savnsmynd*



gult cyan magenta svart

# Nevndin brotið stýrisskipanina

*Sambært løgmanni hevur landsstýrismálanevndin ikki fylgt lógini í málinum um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrismálanevndin hevur ikki gjørt sína skyldu, tá hon kannaði, um Helena Dam á Neystabø hevur borið seg skeivt at í pensjónsmálinum.

Hetta staðfestir løgmaður. Hann vísir á, at nevndin í staðin fyri at kanna málið liðugt, hevur sett fram nakrar spurningar og síðani beint málið yvir á løgmann.

– Hetta er tað sama sum at gera eitt løgfrøðisligt mál til eitt politiskt mál, staðfestir løgmaður.

**Brotið stýrisskipanarlógina**

Sambært løgmanni hevur landsstýrismálanevndin brotið stýrisskipanina, um hon veruliga er so sannførd um, at Helena Dam á Neystabø hevur borið seg so skeivt at, sum Kristian Magnussen og Edmund Joensen vilja vera við.

– Landsstýrismálanevndin eigur sambært stýrisskipanarlógini at seta ein kanningarstjóra at kanna málið, metir hon illgruna vera um, at ein landsstýrismaður hevur borið seg óregluliga at, sigur løgmaður, og hesum er Bjørn á Heygum, advokatur, samdur við honum í. Men landsstýrismálanevndin hevur ikki sett kanningarstjóra at kanna málið. Í staðin hevur hon heitt á skrivara sín um at gera eina frágreiðing um málið.

**Grundaður illgruni**

Í frágreiðingini frá skrivaranum hjá landsstýrismálanevndini er eingin skrivlig niðurstøða. Har verða í staðin settir fram nakrir spurningar, ið sáa iva, um landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur borið seg rætt at í málinum.

Hesir spurningar heldur Bjørn á Heygum, advokatur, vera nóg grundaðan illgruna til, at løgmaður loysir landsstýrismannin úr sessinum, meðan ein óheftur kanningarstjóri kannar málið.

Men løgmaður ætlar sær ikki at loysa landsstýrismannin úr sessinum fyrr enn tað løgfrøðiliga er prógvað, at Helena Dam á Neystabø hevur brotið lógina.

– Skal løgmaður koyra landsstýrismannin frá, má hann fyrst fáa eitt juridiskt grundarlag fyri hesum, sigur løgmaður.

**Má koma við greiðari niðurstøðu**

Løgmaður er ikki nøgdur við, at frágreiðingin frá landsstýrismálanevndini inni-heldur spurningar í staðin fyri niðurstøður.

Hetta heldur hann merkir, at nevndin antin ikki er liðug at viðgera málið, ella at hon er liðug og metir landsstýrismannin vera ósekan.

– Er illgruni nóg mikið til, at ein landsstýrismaður verður koyrdur frá, átti eg sjálvur at verið koyrdur frá, tá landsstýrismálanevndin sáddi iva um meg fyrr í ár. Men kanningin hjá kanningarstjóranum vísti nakað annað, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg fer nú at biðja um fund við landsstýrismálanevndina fyri at vita, um málið er liðugt viðgjørt ella ei.



*Løgmaður heldur ikki málið um Helenu Dam á Neystabø vera avgreitt fyrrenn kanningarstjóri hevur gjørt eina niðurstøðu*

# Nevndin fylgt øllum reglum

*Advokatar staðfesta, at kanningin hjá landsstýrismálanevndini av Helenu Dam á Neystabø er í fullum samsvari við stýrisskipanarlógina*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrismálanevndin hevur ikki skyldu at seta ein kanningarstjóra at koma við einari niðurstøðu í sambandi við kanningina av embætisførsluni hjá Helenu Dam á Neystabø.

Hetta staðfestir Anfinn V. Hansen, advokatur, saman við øðrum advokatum, sosialurin hevur tosað við.

Grundarlagi undir hesi niðurstøðu er tað sama, sum grundarlagi undir ákærunum frá løgmanni um, at landsstýrismálanevndin hevur brotið stýrisskipanarlógina.

Í grein 38, stykki 2 í stýrisskipanarlógini stendur nevniliga, at landsstýrismálanevndin kann krevja, at løgtingsformaðurin setir ein kanningarstjóra, um hon hevur illgruna um, at landsstýrismaðurin hevur borið seg óregluliga at.

**Kann merkir kann**

Advokatarnir eru samdir um, at hetta merkir, at landsstýrismálanevndin kann seta ein kanningarstjóra, um hon metir tað vera neyðugt.

Landsstýrismálanevndin hevur ikki, eins og løgmaður sigur, skyldu at heita á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra.

Tí er tað skeivt, tá løgmaður ákærir landsstýrismálanevndina fyri at hava brotið stýrisskipanarlógina í málinum um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø.

Landsstýrismálanevndin hevur nevniliga, sambært løgfrøðingunum, fullan rætt at gera av, hvussu hon velur at enda eitt slíkt mál.

Tá landsstýrismálanevndin er liðug við málið, er tað upp til politiska myndugleikan at gera av, hvat víðari hendir. Sostætt liggur bólturin nú hjá løgmanni.

**Ikki neyðugt við niðurstøðu**

Anfinn V. Hansen, advokatur, vísir saman við øðrum advokatum á, at tað ikki er neyðugt hjá landsstýrismálanevndini at leggja nakra konkreta niðurstøðu fyri politiska myndugleikan í slíkum málum.

Spurningarnir í frágreiðingini frá skrivaranum hjá landsstýrismálanevndini eru nóg góður endi á viðgerini hjá landsstýrismálanevndini í hesum máli, siga advokatarnir.

Hvørja avleiðing spurningarnir, ið sáa iva um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø, eiga at fáa, er ein spurningur, ið antin løgmaður ella løgtingið eiga at taka støðu til, gera advokatarnir púra greitt.

Advokatarnir vísa á, at løgmaður við grundarlagi í hesum spurningum kann koyra landsstýrismannin frá, men hann hevur kortini ikki skyldu til tess. Teir vísa á, at talan í veruleikanum er um, hvat politiskt verður mett sum brot á landsins lógir.



*Tað er heilt greitt, at kann merkir kann og ikki skal í grein 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini sigur Anfinn V. Hansen, advokatur*

## Stýrisskipanarlógin § 38

Stk. 2. Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, **kann** hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Tveir fimtingar av løgtingsmonnunum kunnu skrivliga seta fram sama krav.

AUKTIÓN
Leygardagin 8. juli kl. 10.00 hevur Bjørn á Heygum bilauktión hjá Bilfríðkan.
Í hesum sambandi hava vit
OPIÐ HÚS FRÁ kl. 9.00-17.00
har høvi verður at síggja og royna teir nýggjastu diesel persónbilarnar frá FIAT
VIT BJÓÐA KAFFI OG KØKUR
Vælkomin á AUKTIÓN og til OPIÐ HÚS leygardagin kl. 9-17
FIAT
Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78 - tel 317300